


*Tað er í hesum umhvørvi úti á gamla Bacalao í Havn, at Aksel Hansen og seinni sonurin Poul Hansen hava sínar røtur sum vinnulívsmenn*

# Minsti parturin fekk nevndarformannin

**Advokaturin og vinnulívsmaðurin, sum nú er vorðin nevndarformaður í nýggja og stóra samtakinum – nýggja fiskivinnurisanum í Føroyum – fekk í boði at gerast nevndarformaður, áðrenn felagið, sum hann hevur rikið, kom við pengum. Í dag eigur Bacalao 5% í nýggja samtakinum**



*Tað fall Poul Hansen, advokati og vinnulívsmanni í lut at gerast nevndarformaður í nýggja og stóra samtakinum*

Vilmund Jacobsen

Tá Poul Hansen, advokatur, varð valdur til nevndarformann í nýggja samtakinum, sum hevur keypt fýra fiskavirkir og seks skip úr trotabúnum eftir Faroe Seafood-samtakið, var tað ikki, tí, at felagið hjá honum átti so stóran part í nýggja felagnum.

– Tá eg varð spurdur um at gerast nevndarformaður, áttu vit nevniliga einki í felagnum, sigur hann.

Í dag eigur Bacalao í Havn, sum Poul Hansen, advokatur, umboðar, 5% í nýggja samtakinum, sum nú eigur ein stóran part av virknu ognunum, sum vóru í trotabúnum eftir Faroe Seafood-samtakið.

– Býtið millum partarnar er nú skipað soleiðis, at Bacalao nú eigur 5%, sum saman við teimum 45% hjá Varðanum í Gøtu geva 50% - og hini 50% eiga ávikavist Framherji á Toftum við 25% og Samherji í Íslandi við øðrum 25%.

Poul Hansen sigur, at eigaraskapurin á ein hátt er tvíbýttur, har Bacalao gongur inn í partin saman við gøtumonnum, soleiðis at hesin tilsamans eisini er 50%.

## Samstarv við Varðan

Spurdur, hvussu tað hongur saman, at Bacalao soleiðis gongur inn saman við gøtumonnum, sigur hann, at samstarvið, sum serliga hevur verið við gøtumenninar, er, at makkarin hjá honum á advokatvirkinum hevur arbeitt fyri Varðan í Gøtu.

Nú Bacalao gjørdist partur av nýggja samtakinum við Poul Hansen sum nevndarformanni, kunnu vit siga, at maðurin við tí minsta partinum fekk hendan álitissess í nýggja føroyska fiskivinnurisanum, sum nýggja samtakið hevur verið rópt.

Poul Hansen sigur, at hansara lutur sum nevndarformaður fevnir bæði um virkir og skip, sum felagið hevur keypt.

Stjórar í nýggja samtakinum eru, sum Sosialurin áður hevur nevnt, Anfinnur Olsen, umboðandi Framherja og Jógvan Dávid Jacobsen, umboðandi Varðan.

Hini í nevndini eru Torsteinn Már Baldvinsson, stjóri í Samherja í Íslandi, Elisabeth Ditleifsdóttir Eldevig Olsen, sum umboðar Framherja og Tummas Thomsen í Gøtu, sum umboðar Varðan.

## Vinnulívsmaður

Sosialurin spurdi eisini Poul Hansen, um eigararnir munnu hava víst honum so stórt álit, tí hann er advokatur – ella tí, at hann hevur røtur í reiðaravirksemi og sjálvur hevur staðið á odda fyri virkseminum hjá Kimbli og Bacalao í fleiri ár.

Pápi Poul er Aksel Hansen, sum flestu kenna frá sínum vinnulívsvirksemi gjøgnum mong ár. Hann er í dag 86 ára gamalur og er sum so ikki virkin longur í hesum virksemi.

– Tað, at eg eri spurdur um at gerast nevndarformaður, trúgvi eg eri ein samantvinning av báðum, bæði mínum vinnulívsvirksemi og mínum dagliga leikluti sum advokatur. Og so er tað eisini tilknýti, sum okkara advokatvirksemi hevur til eitt nú Varðan í Gøtu.

Sosialurin kann leggja aftrat, at Poul Hansen eisini hevur verið í nevndini í Føroya Reiðarafelag. Hann hevur bara fingist við fiskivinnu, og er tað onkur, sum heldur, at maðurin eisini hevur fingist við farmaskipavinnu, er tað hin advokaturin, Anfinnur V. Hansen, sum er tann maðurin.

Poul Hansen hevur um feløgini, sum hann og pápin hava staðið aftanfyri, seinastu árini rikið fýra ísfiskatrolarar. Men hesir eru allir seldir í Vágar. Enn eigur felagið í Havn tó part í hesum skipum, ein lítlan part í øðrum parinum – og umleið 20% í hinum.

– Eg havi soleiðis í eini 15 ár staðið við ábyrgdini av skiparakstrinum hjá okkum, sigur Poul Hansen, sum soleiðis ikki er óroyndur í vinnulívi.

Advokaturin og vinnulívsmaðurin, sum nú er vorðin nevndarformaður í nýggja og stóra samtakinum – ella nýggja fiskivinnurisanum í Føroyum – fekk soleiðis í boði at gerast nevndarformaður, áðrenn felagið, sum hann hevur rikið, kom við pengum.

## Spennandi uppgáva

– Eg eri ógvuliga spentur upp á hesa uppgávu, og høvdu vit ikki trúð upp á hana, høvdu vit heldur ikki farið undir hetta, sigur Poul Hansen, sum Sosialurin tosaði við í gjárkvøldið.

*vilmund@sosialurin.fo*